# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Andlát

13. mars
Jonna Jeppesen, búsitandi í Keypnannahavn, fødd Eidesgaard á Tvøroyri, 76 ár.

19. mars
Hanna Skaale, Tórshavn, 87 ár.
Soffía Hansen, Sandavágur, ættað úr Fuglafirði, 94 ár.

20. mars
Óli Olsen, Leirvík, 82 ár.

21. mars
Tordis Nielsen, fødd Mohr búsitandi í Hals, 70 ár.
Paula Simonsen, Sørvágur, 59 ár.

22. mars
Leon Gunnar Johannesen, Tvøroyri, sonur Teddy og Irdi, 15 ár.

23. mars
Elna Eidesgaard, Eiði, 92 ár.
Nanny Jakobsen, úr Fuglafirði, 87 ár.

25. mars
Páll Patursson, bóndi í Kirkjubø, 60 ár.

Niclas Heri Jákupsson:

## Nýggjur leiðari hjá Føroya Shell í Norðoyggjum

Tann 1. apríl 2004 tekur Niclas Heri Jákupsson í Klaksvík við sum dagligur leiðari hjá Føroya Shell í Norðoyggjum.

Niclas Heri er 35 ára gamal og klaksvíkingur. Hann er útbúgvin skrivstovumaður. Hann arbeiddi sum søluleiðari hjá Kjølbro Heilsølu í sjey ár, til hann í fjør fór at arbeiða hjá felagnum IRIS.

Føroya Shell í Norðoyggjum umfatar t.d. gassolju til hús, skip og bátar, smyrjiolju, hitatænastu og Shellstøðina við Stangavegin.

Niclas Heri er spentur upp á hesa spennandi og avbjóðandi uppgávuna.

Millum børn er Niclas Heri kanska best kendur sum Trølla Pætur.




*Frá 1. apríl 2004 er Niclas Heri Jákupsson settur sum dagligur leiðari hjá Føroya Shell í Norðoyggjum*

*Mynd: Solby A. Eliasen*



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

Tríggir bólkar á Margarinfabrikkini:

## Lama Sea, Side Effect og The Story Ends

TÍÐINDASKRIV

### Livandi tónleikur

Aftur nú leygarkvøldið 27-3.kl 22,verður livandi tónleikur aftur at hoyra í Margarinfabrikkini.

Margarinfabrikkin er kanska einasta veruliga alternativið á føroyska rokkpallinum.Ein sera virkin pallur, har nýggja ættarliðið av tónlistafólkum, einstaklingar eins og bólkar traðka teirra fyrstu stev.

Av nøvnum gjøgnum tíðina sum hava staðið á pallinum kunnu nevnast bólkar sum Happy ?, Makrel Mold, Jóhan í Kollafirði, Jákup Eli, HTV, Lítla Rúm.Headache Blues Treo,Paradox og Toxic.Krit .Sic.Høgni Lisberg band Speaker 48 Pages, onkikanndiskuterast.altkann, Zink.osv osv.

Hildnar verða einar 10-15 kosertir um árið har bólkarnir spæla teirra egna tónleik.




Á konsertini leygarkvøldið spæla tríggir bólkar teir eru:

The Story Ends spæla tað teir nevna alternativan punkrokk:Hetta er teirra fyrsta konsert í Havn,teir hava hava spælt í Eyðnuni saman við Makrel.

Side Effect spælir rádyrkaðan tekcno,fyri fyrstu ferð í langa tíð aftur á palli, við nýggjum sera spennandi tilfari.

Lama Sea spæla sera spennandi alternativan uptown rokk.

## Klokkan flytast fram

Sunnunáttina sleppa vit at sova ein tíma styttri, tí kl. 2 skal klokkan flytast til kl. 3.

Tað eru ikki øll, sum hava so lætt við at minnast hvønn veg klokkan skal flytast, men í morgunsendingini hjá Útvarpinum fríggjamorgunin komu teir við einum góðum ráðum: Um várið tekur tú havastólarnar **fram** og um heystið tekur tú teir inn ***aftur***.

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg



# Skulu venja seg við ein nýggjan leiklut

**Av teimum átta tinglimunum hjá tjóðveldisflokkinum, hevur bara Hergeir Nielsen, roynt at sitið í andstøðu áður og á flokstingi hetta vikuskiftið fer formaðurin at greiða frá, hvussu flokkurin ætlar sær at arbeiða í andstøðu**

FLOKSTING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit stúra ikki fyri okkara nýggja leikluti í politikki.

Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins er til reiðar at átaka sær nýggju avbjóðingina sum tingmaður í andstøðu.

Hetta vikuskiftið hevur tjóðveldisflokkurin flokssting í Klaksvík og har fer ein fittur partur av tíðini at greiða frá, hvussu flokkurin skal skipa seg í andstøðu.

Av teimum átta tinglimunum hjá tjóðveldisflokkinum, er tað bara Hergeir Nielsen, sum hevur roynt at sitið í andstøðu áður.



*Tingfólkini hjá tjóðveldisflokkinum eru komin í ein óvanligan leiklut og á flokstingi í Klaksvík í dag, fer Høgni Hoydal, floksformaður, at brúka nógva tíð uppá at greiða frá, hvussu tjóðveldisflokkurin ætlar at fóta sær*

Annars er øll tingmanningin frá 1998, ella yngri og alla hesa tíðina hevur flokkurin verið í samgongu.

Men Høgni Hoydal vísur á, at av teimum átta tingfólkunum, eru tað heili fimm, sum hava sitið í landsstýrið og tí hava tey kortini góðar royndir við lógarsmíði og politiskum arbeiði.

Á flokstinginum fer ein stórur partur av frágreiðingini hjá Høgna Hoydal, at vera um, hvussu flokkurin skal skipa seg í hesum nýggja leiklutinum, og um, hvussu flokkurin kann føra ein framrættaðan andstøðupolitikk. Og ikki minst fer hann at nógv tosa um, hvussu flokkurin skal bera seg at við at føra fullveldispolitikk í andstøðu.

Høgni Hoydal ásannar, at tað verður trupult ímóti eini so stórari samgongu, sum hesari.

Men at tjóðveldisflokkurin ikki ætlar sær at sita hendur í favn í andstøðu, hava vit longu fingið sjón fyri søgn um.

Nýggja Løgtingið er ikki meiri enn komið í eyga, men kortini hevur tjóðveldisflokkurin longu lagt 16 uppskot fyri tingið, umframt at flokkurin hevur gjørt uppskot til eina fíggjarlóg fyri í ár, sum eitt mótuppskot til landsstýrið.

Men tað verður eisini nógv at tríva í hjá flokkinum, tí Høgni Hoydal sigur, at tað liggja stórmál framman stavn, sum fara at fáa avgerandi týdning fyri framtíð Føroya.

Høgni Hoydal hugsar eitt nú um ætlanina at gera eina nýggja yvirtøkulóg og um NATO-málið.

– Í hesum báðum málunum er landsstýrið í ferð við at avreiða okkara sjálvsavgerðarrætt og at leggja allar heimildir upp í hendurnar á dønum. Yvirtøkulógin, sum nú er uppá tal, er sama loysn, sum Poul Nyrup bjóðaði okkum, men sum vit ikki skoyttu um og tí er hon eitt stórt afturstig fyri føroyskan sjálvstýrispolitikk. Sama er við NATO málinum, har allur myndugleiki skal latast yvir til danir, men at vit afturfyri skulu sleppa at sita til borðs saman við teimum og billa okkum inn, at vit hava eitt orð at skula hava sagt, sigur Høgni Hoydal.

### Nýtt fólk í nevnd

Flokstingið er á tekniska skúla í Klaksvík og har skulu í hvussu so er tvey nýggj fólk veljast í starvsnevndina.

Heini O.Heinesen var politiskur næstformaður í flokkinum, men hann er ikki virkin politikari longur. Hinvegin var Heidi Petersen forkvinna í aðalstjórnini og skipanarligur næstformaður, men nú er hon virkin politikari. Sostatt skulu teir báðir sessirnir skulu veljast av nýggjum.

Høvuðsevnið á flokstinginum, sum er alment, er virðisøking – virðisøking í vinnuni, virðisøking ímillum menniskju og virðisøking ímillum tjóðir.

Í tí sambandi verða áhugaverdir fyrilestrar á skránni. Í morgun klokkan 9.30, fer íslendski politikarin. Steingrímur J. Vigfússon, at tosa um virðisøking ímillum tjóðir. Eftir døgverða, klokkan 14.00, fer Egil Olsen, fiskivinnufrøðingur at halda fyrilestur um vinnuliga menning og klokkan 15.30, fer Malena Arnoldsdóttir, forkvinna í Javna, at røða um virðisøking ímillum menniskju og.

Kanska skal eisini ein grønlendskur politikari halda røðu. Eydnast tað honum at koma, fer hann á pallin í morgun, beint eftir íslendingin.

Annars var skráin fyri flokstinginum í Sosialinum hósdagin.

# Ov seint at tryggja húsini tá ið tey standa í ljósum loga

**– Vandin fyri, at alingin í Føroyum fer heilt fyri bakka, er avgjørt til staðar, sigur Føroya Banki**

KREPPAN Í ALIVINNUNI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er ov seint at tryggja húsini ímóti eldi, tá ið tey standa í ljósum loga.

Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka kann vera nokk so hittinorðaður.

Og at tað er ov seint at tryggja húsini, tá ið tey standa í ljósum loga, er sjálvsagt.

Men tað, sum stjórin í Føroya Banka sipar til, er tann hugburður, sum landsstýrið hevur ímóti okkara alivinnu.

Í ársfrágreiðingini fekk støðan í alivinnuni heilt fitt av umrøðu.

Og Bankin ásannar, at føroyska alivinnan er í svárari kreppu.

– Serliga alivinnan hevði tað ringt í fjør. Og tá ið vinnan hostar, njósir Føroya Banki, sigur stjórin á sínum sermerkta myndamáli.

– Síðani á sumri 2001, hevur marknaðarprísurin verið so lágur, at hann hevur verið undir framleiðslukostnaðinum.

– Serliga tá ið avleiðingarnar av ILA skulu takast við í roknistykkinum, er marknaðarprísirnir alt ov lágir.

Bankin sigur, at sjálvsagt er tað ójavnt, hvussu tey ymsu alibrúkini eru fyri.

– Men sum heild eginpeningurin, og meiri enn tað, í alivivinnuni brúktur og vandin er heilt avgjørt til staðar fyri, at alivinnan, sum hevur staðið fyri einum fjórðingi av útflutninginum, fer heilt fyri bakka.



*– Tá ið vinnan hostar, njósir Føroya Banki, sigur Jørn Astrup Hansen. Hann átalar landsstýrið fyri at hava ligið sjóvarfallið av sær í sambandi við alivinnuna*

Tað er ikki fyrrenn nú, at landsstýrið hevur sagt, at tað er sinnað at lata útlendingar rúmari ræsur at gera íløgur í føroyska alivinnu. Og tað er heildur ikki, fyrrenn nú, at landsstýrið hevur gloppað dyrnar fyri at peningastovnarnir kunnu taka pant í einum aliloyvi.

– Tað er átaluvert, at tað skuldi taka so langa tíð, áðrenn loyvi fekst til at seta aliloyvini í pant og tað er nívandi, at tað harafturat skuldi fáa politiska mótstøðu, sigur Føroya Banki.

– Men nú er vinnan at kalla farin fyri bakka og nú var tað nakað seint, at landsstýrið kom uppá aðrar tankar, sigur Føroya Banki í ársfrágreiðing síni á aðalfundinum í Bankanum hósdagin.

– Tað er eisini langt síðani nú, at Eystari Landsrættur hevur staðfest, at tað er loyvt at seta sjálv aliloyvini í pant.

– Hetta er eitt mál, sum Bankin hevur ført fram í fleiri ár nú, men fyri deyvum oyrum.

– Í dag duga øll at síggja, hvussu neyðugt tað er, at peningastovnarnir kundu tikið pant í aliloyvunum.

Hann sigur, at nú er alivinnan at kalla steðgað og nú eru ongir útlendingar, sum hava áhuga fyri at gera íløgur í alivinnuna.

– Høvdu útlendingar kunna sett meiri íløgur í alivinnuna fyri tveimum árum síðani, kundu teir hildu vinnuni ígongd, men nú er peningurin uppi.

Jørn Astrup Hansen sigur, at skal alivinnan bjargast, er tað ein avgjørd fortreyt, at vit fáa treytaleysa bilbukt við ILA.

Stjórin í Føroya Banka ásannar, at vit hava verið alt ov leingi um at taka ILA í álvara

– ILA drepur ikki bara laksin. ILA drepur alla vinnuna, sigur stjórin.

Hann sigur, at sjálvsagt er tað eisini ein fortreyt, at marknaðarprísirnir hækka.

Men tað stýrir hann ikki so illa fyri.

– Tað skal nokk koma, tí aling er ein vinna, har prísirnir sveiggja rættiliga nógv, sigur hann.

Tó leggur Jørn Astrup Hansen afturat, at sum støðan hevur tikið seg upp, serliga við ILA og marknaðarprísinum, veit hann ikki, hvussu stóran mun, tað hevði gjørt, um útlendingar høvdu kunnað gjørt størri íløgur í alivinnuna.

Men tað er ikki fyri at bera í bøtuflaka fyri landsstýrið, at hann sigur tað, tí hann heldur framvegis ikki, at tað kann forsvarast, at landsstýrið súltaði málið so leingi.

Tí við at gera tað, fekk alivinnan í hvussu so er ongan møguleika.

– Tað vita vit ikki. Men tað einasta, vit nú kunnu vóna, er, at alingin yvirlivur sum vinna.

– Men, sum støðan er, eru alibrúkini farin á heysin, ella fara tey á heysin heilt skjótt.

– So hóast alivinnan sum heild kemur fyri seg aftur, er tað ivingarsamt, hvussu tað verður í Føroyum, tí tá eru helst allir alarar farnir á heysin.

– Í Føroyum er peningagrundarlagið veikt og skal nakar møguleiki verða aftur í framtíðini, verður brúk fyri útlenskum kapitali.

– Men tað, sum er tað mest neyðuga av øllum, er at fáa endaliga bilbukt við ILA, endur tekur Jørn Astrup Hansen.

## Johan Páll heldur fram

Á aðalfundi í Føroya Banka hósdagin, fekk bankin ein nýggjan nevndarlim. Jákup Jacobsen, sum hevur sitið í nevndini í fimm ár, fór úr nevndini og í hansara stað var Johannus Egholm Hansen, løgfrøðingur í Keypmannahavn, valdur.

Starvsfólkaumboðið í nevndini, Magnhild H. Andreasen, fór eisini úr nevndini og í hennara stað var Sigmar Jacobsen, valdur.

Annars hevur nevndin skipað seg soleiðis, at Johan Páll Joensen heldur fram sum formaður og næstformaður er Rúni Hansen.

Hinir tríggir nevndarlimirnir eru Høgni Hansen, Jógvan Jespersen og Johan E. Hansen.

**– Áki –**